## Oyggjaleikir 2011 verða á Wight

Í kapprenning við Bermuda eydnaðist tað í vikuni Isle of Wight at vinna vertsskapin til Oyl í 2011

Hetta varð avgjørt, nú altjóða oyggjaleikanevndin hevði aðalfund í vikuni. Roknað varð annars við, at Bermuda hevði góðan møguleika at fáa vertsskapin, men sum skilst, so ætla tey nú at dyrgja eftir vertsskapinum í 2013.

Tað er annars árið, har Føroyar eisini hava tosað um at søkja um vertsskap, men sum skilst, so eru føroyingar nú sinnaðir at bíða í tvey ár við hesum. Serstakliga tí tað mangan hevur verið eitt slag av rotatiónspolitikki í vertsskapinum, og at kabalin tí gongur upp við norðurlendskum vertsskapi aftur í 2015. Tað er longu avgjørt, at Oyggjaleikirnir í 2009 verða á Álandi.

## Ronaldinho biður um umbering



Tað var ikki stórvegis samba yvir spælinum hjá Brasil í HM-endaspælinum í Týsklandi, og tað eru stjørnuspælararnir á liðnum eisini greiðir yvir. Størsta stjørnan á liðnum hevur mest sum hug at biðja um umbering fyri avrikið.

- Nógv fólk høvdu væntað nakað stórt frá liðnum og kanska serliga mær, men tað kom tíverri ongantíð, sigur Ronaldinho á heimasíðu sínari.

- Eg eri keddur av, at vit ruku út úr HM, áðrenn vit veruliga høvdu fingið víst okkara evni. Hetta kann eg ikki broyta nú, og tí vil eg biðja um umbering fyri hetta, sigur Ronaldinho.

# Todi mátti skilja lið-felagar at

**Tað gekk so harðliga fyri seg til venjingina hjá Start mánadagin, at Todi Jónsson mátti leggja upp í, tá ið tveir liðfelagar ætlaðu sær til hendurs. Todi Jónsson verður aftur at síggja á føroyskum vølli hóskvøldið**




*Todi Jónsson spælir í annaðkvøld aftur á føroyskum vølli. Hann er komin við Start til Føroya fyri at spæla UEFA Cup dyst ímóti Skála*

UEFA CUP

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Start-spælararnir taka ikki lætt upp á uppgávuna ímóti Skála hóskvøldið. Mánadagin vandu teir heima í Kristianssand, og har gekk lívliga fyri seg, skrivar blaðið Fedrelandsvennen.

Tveir av spælarunum endaðu í einum hørðum nærdysti. Marius Johnsen fekk eina harðliga takkling frá Ruthford Petersen, og fór og sendandi við Ruthford omaná sær. Marius sveiggjaði við bæði beinum og armum í irritatión yvir taklingina, og Ruthford leyp á føtur í øði og var klárur at fara til hendurs.

Føroyski spælarin í Start, Todi Jónsson, var staddur beint hjá, og hann leyp ímillum fyri at verja tann liggjandi Marius Johnsen.

- Hatta hevði ikki so nógv upp á seg. Tað hendir í øllum feløgum, at spælarar blíva illir við hvørt, sigur Todi Jónsson um hendingina.

Start-venjarin Tom Nordlie gerheldur ikki hóvasták burtur úr hendingini.

– Tað er gott við eitt sindur av hita og vilja til venjing. Eg leggi bara upp í, um spælarar takkla harðliga aftanífrá ella hevna seg, sigur hann við Fedrelandsvennen.

Fyrrapartin setti ferðalagið hjá Start kós ímóti Føroyum. Teir høvdu leigað flogfar og flugu tí beinleiðis úr Noregi til Føroya. Í kvøld skulu teir hava eina venjing á Toftum, og í annaðkvøld verður dysturin ímóti Skála spældur á Svangaskarði.

– Vit hava góðar vónir til dystin, men vit vita eisini, at vit skulu taka uppgávuna í stórum álvara. Tað átti at verið munur millum Start og Skála, tí vit eru professionellir og spæla í eini sterkari kapping, men vit vita eisini, at føroysk lið geva seg hundrað prosent í Europa Cup dysti. Longri teir kláru at halda nullið, meira orku fáa teir, og truplari verður tað hjá okkum, sigur Todi Jónsson.

– Eg vóni, at vit kláru at vinna dystin, men vit kunnu eisini liva við einum javnleiki, sigur hann.

### Todi spælir

Tveir av spælarunum hjá Start eru skaddir til dystin ímóti Skála hóskvøldið. Todi Jónsson er frískur og klárur at spæla.

– Vit hava ikki fingið liðuppstillingina enn, so eg veit ikki, um eg skal byrja inn, men eg vóni tað. Eg havi spælt hampuligt í seinastu dystunum, og vónandi skal eg spæla ímóti Skála, sigur hann.

- Vit hava ikki spælt so væl seinastu dystirnar, og vit høvdu tað trupult í einum steypadysti ímóti einum 1. deildarliði herfyri, so vit vita væl, at vit skulu gera ein góðan innsats ímóti Skála fyri at fáa eitt gott úrslit.

### Johan lítlar vónir

Blaðið Fedrelandsvennen hevur tosað við Skála-venjaran Johan Nielsen, og vónirnar hjá honum til dystin ímóti Start eru ikki góðar.

– Vit hava ongan møguleika til at koma víðari. Tað besta, vit kunnu vóna, er at fáa ein javnleik á heimavølli, sigur Johan Nielsen við blaðið.

– Eg havi ikki sæð Start spæla í ár, men eg sá teir spæla í fjør. Teir eru væl fyri kropsliga og halda eitt gott norskt støði, sigur hann.

# B36 spruttaði í

**B36 fekk í gjárkvøldið besta úrslitið hjá føroyskum felag í europeiskum dysti nakrantíð, tá ið liðið vann 3-0 á útivølli ímóti maltesisku meistarunum. B36 hevði fult tamarhald á dystinum í tí nógva hitanum á Malta**

CHAMPIONS LEAGUE

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

B36 framdi týskvøldið veruligt bragd í europeiskum dysti á Malta. Føroysku meistararnir spældu ímóti maltesisku meistarunum, og dystin vann føroyska liðið heili 3-0.

B36 var farið til Malta fyri at tryggja sær eitt gott útgangsstøði til seinna dystin, sum verður spældur í Føroyum í næstu viku, men B36 mest sum tryggjaði sær víðari luttøku í kappingini beinanvegin.

B36 var betra liðið á vøllinum, teir vóru betur fyri kropsliga, spældu betur og vardu betur. Birkirkara kom ongantíð til veruligar kjansir, meðan B36 í hinum endanum skapti fleiri møguleikar og útnyttaði teir eisini.

Tríggjar ferðir skoraði B36 upp á sínar málmøguleikar, og tað úrslitið er so sannførandi, at tað skal verða løgið, um B36 ikki kemur víðari til næsta innleiðandi umfar í Champions League, har turkiska stórfelagið Fenerbahce bíðar.

### Fyrireikaðu seg væl

B36 fór í góðari tíð til Malta at fyrireika seg til dystin týskvøldið. Hitin á Malta er væl hægri, enn hann er í Føroyum, og tað var ein eyka mótstandari hjá B36 til dystin. B36 vandi fleiri ferðir í nógvum hita á Malta, og annars fyrireikaðu spælararnir seg miðvíst til dystin.

Birkirkara royndi eisini at manna seg upp til dystin ímóti gestunum norðanífrá, og heilir fýra nýggir spælarar komu til felagið stutt undan dystinum. Spælararnir vóru fingnir til vega frá Italia, Fraklandi og Póllandi, og teir skuldu styrkja um liðið, sum annars var rakt av fleiri skaðum.

At dysturin í næsta umfari verður ímóti Fenerbahce er eisini ein stór motivatión, tí slík uppgáva er sera krevjandi og spennandi, og hon kann hava fitt av inntøkum við sær til felagið.



### Sylla sló til

Dysturin millum Birkirkara og B36 varð spældur á tjóðarleikvøllinum í høvuðsstaðnum Valletta, og tað var ein góð hjálp fyri B36, at dysturin varð spældur tíðliga á kvøldinum, tí tá er hitin ikki so øgiligur, sum hann kann vera mitt á degnum. Tað vóru eini 25 hitastig, meðan dysturin varð spældur í gjárkvøldið, og B36-spælararnir máttu ansa væl eftir at fáa ivaleyst av vesku undan og undir dystinum.

## FAKTA

**Birkirkara-B36 0-3 (0-2)**
*Champions League, 1. innleiðandi umfar*
*Tjóðarleikvøllurin í Valletta á Malta*
**0-1:** Ahmed Davy Sylla, 14.
**0-2:** Ahmed Davy Sylla, 32.
**0-3:** Hanus Thorleifsson, 89.
**Dómarabólkur úr Hvítarusslandi:** Sergei Shmolik, Vasili Kalinovski, Dzmitry Siamionau og Igor Kruh
**UEFA-umboð:** Peter Jones, Ongland
**Birkirkara:** Andrzej Bledzewski – Roderick Sammut (Steve Sadowski, 65.), Guido Gallovich, Kenneth Scicluna, Lino Galea, William Camenzuli, George Mallia, Matthew Calscoine (Alan Tabone, 71.), Angelo Paradiso, Hatim Sbai (Thomas Paris, 52.), Jean Pierre Mifsud Triganza
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Alex José dos Santos - Johan Ellingsgaard (Jóhan V Gunnarsson 63.), Klæmint Matras, Mikkjal Thomassen, Bergur Midjord (Símin Hansen 88.), Hanus Thorleifsson - Amed Davy Sylla (Óbi, 74.)